

*Fiskavirkið Norðfra í Norðdepli fer eisini at merkja príshækkingina hjá Strandferðsluni sera væl*
*Mynd: Solby A. Eliasen*

# Príshækking hjá Strandferðsluni fer at merkjast

**- Príshækkingarnar hjá Strandferðsluni fara at merkja ein meirkostnað upp á millum 50.000 og 100.000 krónur um árið fyri okkum, sigur Jógvan Høj, stjóri á virkjunum, Norðurfisk í Árnafirði og Norðfra í Norðdepli**

PRÍSHÆKKING
*Solby A. Eliasen*

**Norðdepil:** Fiskavirkið Norðfra keypir meginpartin av fiskinum frá uppboðssøluni kring landið og meginparturin verður so avskipaður úr Runavík. Hetta merkir so samstundis eisini, at Strandferðslan spælir ein týðandi leiklut í teirra flutningsvirksemi, tá tað kemur til keyp og sølu. Og nú Strandferðslan hevur ætlanir um at hækka prísirnar við umleið 20 %, fer tað uttan iva at merkja vinnulívið. Jógvan Høj er stjóri á virkjunum Norðurfisk í Árnafirði og Norðfra í Norðdepli.

- Tað er sjálvandi ongantíð stuttligt at skula gjalda meira, men tað vita vit, at vit koma at gera, tá príshækkingin verður veruleiki, sigur Jógvan Høj. Hann leggur tó afturat, at tað týdningarmiklasta er, at virkini eru álítandi.

- Tað týdningarmiklasta er, at vit eru álítandi bæði yvir fyri okkara starvsfólki og okkara keyparum. Soleiðis, at starvsfólkið kann líta á, at fiskurin er har, tá tey koma til arbeiðis, og at vit levera til tíðina. Tað er av størri týdningi enn tað, at vit noyðast at gjalda meira fyri flutningin, sigur Jógvan, sum ikki væntar at flutningsstuðulin til virkini fer at hækka aftur fyri, um Strandferðslan hækkar sínar prísir.

- Tað er í øllum førum ikki nøkur gongd, sum týðir á tað, sigur stjórin á Norðfra og Norðurfisk.

Hann greiðir eisini frá, at tað frammanundan er ógjørligt hjá virkjunum norðanfyri Klaksvík at fáa bíligan flutning.

- Tann flutningsfyritøkan, sum vit nýta hevur ein bil, sum er gjørdur serliga til flutning norðanífrá. Tað kemst av tí, at bergholini eru so lág, at ein vanligur trailara ella ein vanlig bingja passa ikki ígjøgnum. Og tá bilar koma norður við kørum, tá hava teir einans tvey rað stápladi upp á bilin ístaðin fyri trý, sum tað kundi latið seg gjørt, um bergholini vóru hægri, greiðir Jógvan Høj frá.

Norðurfisk keypir onkuntíð frá uppboðssøluni í Vági eisini, men stjórin væntar ikki, at tað at Strandferðslan niðurleggur túrin inn á Vág, fer at hava stóran týdning fyri virkini í norðanfyri.

- Teir hava ein fastan framferðarhátt, tá tað kemur til flutning millum Vág og Tvøroyri, tí teir selja jú allar dagar í Vági og ikki bara tann dagin, tá Smyril er har. So tað vænti eg ikki fer at merkjast hernorðuri hjá okkum, men tað kann gott vera, at suðuroyingar siga nakað annað, sigur Jógvan.

Sum er, fer fiskurin, sum skal til Evropa, við skipafelagnum, meðan restin, sum er tann størri parturin, verður fluttur til Runavíkar, har tað fer við einum skipi til USA.

# Læknamiðstøð í Klaksvík um tvey ár

**Arbeiðið upp á læknamiðstøðina í Klaksvík er nú byrjað. Gongst sum ætlað, so verður hon liðug um ársskifti 2004/05**

LÆKNAMIÐSTØÐ
*Solby A. Eliasen*

**Klaksvík:** Tað hevur longi verið upp á tal at byggja eina læknamiðstøð í býnum - ikki tí at hølini, har kommunulæknarnir halda til í dag ikki eru nøktandi. Men harafturímóti eru atkomumøguleikarnir sera vánaligir og als ikki nøktandi.

Hetta sigur Steinbjørn Jacobsen, borgarstjóri. Hann fegnast um, at arbeiðið nú er farið í gongd og greiðir frá, at kommunan bíðaði við at lata tað byrja til nýggja árið var byrjað.

- Hetta kemst av íløgukarminum hjá kommununi, sum ikki loyvdi okkum at byrja fyrr, sigur borgarstjórin, sum ikki ivast í, at hetta fer at koma væl við bæði hjá sjúklingum og læknunum sjálvum.

Verkætlanin bleiv samtykt og útboðin seinast í 2002, og tað er P/f Norð-urhús við Rógva Josephsen, sum fer at standa fyri allari byggingini av miðstøðini.



*Arbeiðið upp á longi ætlaðu læknamiðstøðina í Klaksvík er nú farið í gongd*

Tá læknamiðstøðin verður liðug, væntandi um ársskiftið 2004/05, verður tað ein bygningur upp á millum 350 og 400 fermetrar í tveimum hæddum. Viðtaluhøli verða til øll fýra kommunulæknastørvini, sum Norðoya læknadømi er normerað til. Men sum er, eru einans trý av teimum fýra størvunum sett. Um hetta verður broytt til ta tíð, veit Steinbjørn Jacobsen ikki at siga. Tí støðan innan kommunulæknar í landinum er ikki góð yvirhøvur.



# Fara aftur á slóðina í Hoyvík

**Leygarkvøldið verður skipað fyri grannaveitslu í Hoyvík. Hetta er ein veitsla, sum er fyri 1. og 2. útstykking uppi í Hoyvík, og er hetta ein veitsla, sum er komin ístaðin fyri tær gomlu bygdaveitslurnar, sum vóru fyri 25 árum síðani**

VEITSLA
*Ingrid Bjarnastein*

Nú leygarkvøldið verður skipað fyri eini stórari grannaveitslu uppi í Hoyvík. Tað eru nú 25 ár síðani, at byrjað varð við teimum gomlu bygdaveitslunum uppi í Hoyvík, men hesar veitslurnar duttu niðurfyri eftir nøkur ár. Nú verður so skipað fyri eini grannaveitslu fyri 1. og 2. útstykking – hetta eru tey, sum búgva undir Vegnum Langa.

– Fyri 25 árum síðani høvdu vit bygdaveitslur í Hoyvík. Tær nýggju útstykkingarnar fóru í gongd, og vit vóru øll fremmand fyri hvørjum øðrum, greiðir Katrin Dahl, sum er ein av fyriskiparunum, frá.

– Tá byrjaðu vit við bygdaveitslum. Soleiðis komu vit at kenna hvønn annan, og vit vórðu samanrist.



*Leygarkvøldið verður skipað fyri grannaveitslu uppi í Hoyvík. Katrin Dahl er ein av fyriskiparunum, og sigur hon, at áhugin fyri veitsluni er stórur*

Katrin Dahl sigur tó, at so hvørt sum Hoyvíkin helt áfram at vaksa, datt hetta við bygdaveitslu niðurfyri, tí økið gjørdist so stórt, og ringt var at halda tamarhald á øllum.

– Nú hava øll grannaløgini í Hoyvík grannaveitslur. Tey inni á Flat, millum Gilja, inni á Gøtu, tey hava øll sínar egnu veitslur, og tí hildu vit, at tað var hóskandi at vit fóru at hava okkara egnu.

### Aftur á slóðina

Leygarkvøldið verður so farið »Aftur á slóðina«, sum tey nevna veitsluna, uppi í Hoyvík.

– Eg havi varhugan av, at hetta fer at verða ein succes, sigur Katrin Dahl. – Vit hava fingið nógvar fyrispurningar, og áhugin fyri veitsluni er stórur.

Grundin til, at farið verður undir eitt slíkt tiltak, sigur Katrin er, at samanhaldið í grannalagnum vantar. Soleiðis kunnu øll aftur koma at kenna hvønn annan, og øll tey, sum hava búð uppi í Hoyvík í 25-30 ár kunnu eisini koma í samband við tey nýggju fólkini.

Veitslan verður hildin júst sum bygdaveitslurnar vórðu hildnar fyri 25 árum síðani. Tey, ið ynskja at vera við, skulu tekna seg. Uppi í skúlanum í Hoyvík verður so borðreitt.

– Breyð, smør og sild verður sett á borðið, og harafturat hava so skulu tey, ið verða við hava ein rætt við, soleiðis, at tað verður til eitt stórt sjálvtøkuborð, har vit kunnu bjóða hvørjum øðrum til borðs.

Lokalt undirhald, skemt og sangur er á skránni og aftaná verður dansur. Bæði føroyskur og eisini kemur onkur at spæla til dans seinni.

Katrin Dahl sigur, at um undirtøkan er nóg góð, so kann tað væl vera, at hetta gerst eitt afturvendandi tiltak. Hon vónar, at onkur ung kanska fara at taka yvir og skipa fyri hesum aftur í framtíðini.

– Men nú vil eg fyrst og fáa hesa veitsluna væl frá hondini fyrst, sigur Katrin Dahl at enda.

# Á ferð við Sosialinum

**Seinastu tvær vikurnar hava tvær gentur úr Suðuroy verið í starvsvenjing á Sosialinum. Eva Laursen og Anita Lisberg ganga báðar í 9. flokki í Tvøroyrar skúla, og seinastu tvær vikurnar hava tær vitjað runt landið har Sosialurin heldur til**

STARVSVENJING
*Ingrid Bjarnastein*

Eva Laursen og Anita Lisberg eru ávíkavist 16 og 15 ára gamlar. Tær báðar ganga í 9. flokki í Tvøroyrar skúla, og seinastu tvær vikurnar hava tær verið í starvsvenjing her á Sosialinum.

Meðan tær hava verið her hava tær millum annað ferðast víða kring klettarnar. Tær hava vitjað lokalredaktiónir, bæði í Klaksvík, Runavík og Vágunum.

Í Vágunum fingu tær eisini ein rundtúr í oynni við okkara lokala blaðmanni, Edvard Joensen, har koyrt var í hvønn krók koyrandi er til. Heilt frá Bø til at síggja Maersk flogfari lætta sær á, og við tað, at tær vitjaðu í Vágunum, sluppu Eva og Anita sín fyrsta túr ígjøgnum undirsjóvartunnilin.

– Okkum hevur dámt væl her á Sosialinum. Vit eru slopnar at royna nógv ymiskt – meira enn onnur eru sloppin, sum hava verið í starvsvenjing aðrastaðni, siga Eva og Anita.



*Anita Lisberg, 15 og Eva Laursen, 16, hava seinastu tvær vikurnar verið í starvsvenjing á Sosialinum. Her eru tær avmyndaðar á lokalredaktiónini í Sandavági saman við Edvard Joensen, blaðmanni*

Eisini hava tær skrivað tilfar til ungdómsblaðið <ph_1>, og harumframt hava tær eisini hjálpt til inni á marknaðardeildini.

## Restorff og Prix Føroyar

TÍÐINDASKRIV

Restorffs Bryggjarí hevur gjørt avtalu við fyrireikararnar av Prix Føroyum um at Restorffs skal veita tostadrykkirnar til luttakararnar í Prix Føroyum meðan kappingarnar fara fram.

Restorff er sera fegið um at sleppa at verða við at stuðla Prix Føroyum og vónar at næsta stigið verður at Føroyar fara at luttaka á altjóða Grand Prix.

Restorff ger nakað við tónleikin og uttanfyri Verthúsið hjá Restorff í N. Finsensgøtu verður hvønn fríggjadag seinnapart í summar uttandura konsert. Allir luttakararnir í Prix Føroyum fáa høvi at luttaka í hesum konsertum.